# 23 lotto-millióningar í Grønlandi

**EYDNUSPÆL** Síðani 1989 eru 23 persónar í Grønlandi vorðnir millióningar.

Snorri Brend

Síðani 1989 eru 2.497 grønlendingar, føroyingar og danir vorðnir lotto-millióningar. Íalt eru fluttar 10 mia krónur inn á konto'ir teirra.

Hetta eydnuspælið byrjaði í oktober mánaði fyri sløkum 22 árum síðani. Fýra ár seinni kom Onsdags Lotto og í 2000 sá Joker dagsins ljós.

Ein uppgerð vísir, at í miðal hava vinningarnir verið 3,8 mió krónur.

Størstu eydnuna hava tey havt, sum hava spælt Lotto, tí av teimum sløku 2500 vinnarunum, hava næstan 2000 teirra keypt ein slíkan seðil.

At enda kann verða nevnt, at flestu vinningarnar eru falnir í økinum kring Keypmannahavn, meðan tríggir teirra eru endaðir í Føroyum.




*Glaðir lotto-vinnarar bæði í Danmark, Grønlandi og Føroyum*

**Norðuratlantsbólkurin – 10 ár á Borgini:**

## - Bindur Føroyar og Grønland saman

**SJÁLVRÆÐI**
– er okkara yvirskipaða mál. Við viðurkenningini av, at frælsi krevur ábyrgd, arbeiða vit virkið fyri veruligum eins og formligum sjálvræði.

**SAMHUGI**
– er reyði tráðurin, sum gongur gjøgnum arbeiði fyri sjálvræði og líkarætti fyri lond okkara, bæði í altjóða samanhangi og ikki minst í sambandinum við Danmark.

**AT VERA SJÓNLIG**
– er avgerðandi í royndunum at gera Føroyar og Grønland til virknar og týðiligar viðleikarar á altjóða pallinum. Vit arbeiða fyri upplýsing og forstáilsi fyri áhugamálum Føroya og Grønlands á Fólkatingi eins og úti í heimi.

**Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri:**



»Norðuratlantsbólkurin hevur megnað at varpa ljós á Føroyar og Grønland gjøgnum arbeiðið á Fólkatingi. Ráðstevnurnar, sum bólkurin hevur skipað fyri, um evnir sum framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum, búskap, verjupolitikk og hvalaveiðu hava verið við til at skapa viðkomandi kjak og kunnleika um sambondini í ríkisfelagsskapinum, og hesum heilsi eg vælkomnum«




www.dnag.dk